# Fyrsta tapið til SÍ

**KVINNUFLOGBÓLTUR Mjølnir syrgdi í gjár á heimavølli fyri, at SÍ-kvinnurnar ikki longur eru ósigraðar – og tað varð enntá gjørt við einum 3-0 sigri**

Hilmar Jan Hansen

Bara eitt umfar er eftir, til fyrsti triðingurin í Eik-liguni hjá kvinnum er spældur, og tá fær oddaliðið ein eykavinning, sum er pláss í steypafinaluni. Í løtuni liggja fýra lið framvið, men hóast tapið í Klaksvík í gjár, sær út til, at SÍ liggur best fyri.

Sørvágskvinnur hava 10 stig, og so koma Mjølnir, Fleyr og ÍF við átta stigum í part. Úrslitini í næsta umfarinum kunnu tí gerast rættiliga áhugaverd, tí tey verða avgerandi fyri, um tað verður SÍ ella eitt av hinum trimum liðunum, ið megnar at tryggja sær annað steypafinaluplássið.

SÍ hevur higartil sæð út sum stórfavorittur, men í gjár mátti liðið leggja rygg til ársins fyrsta tap, tí í Klaksvík gjørdu kvinnurnar hjá Mjølnir bart og vunnu ein uppibornan 3-0 sigur. At hetta heldur ikki var dagurin hjá SÍ, sást kanska eisini av, at Mjølnir gjørdi upp í fleiri servufeilir í hvørjum setti, uttan at SÍ megnaði ella dugdi at revsa tað.

Hinvegin var tað serliga í álopspartinum, at Mjølnir gjørdi av við SÍ. Kantarnir báðir, Birgit Guttesen og Suffía Purkhus, vóru sera avgjørdar og vunnu mestsum allar bóltar, tær fóru eftir. Tær vóru tryggar og sterkar, og ferð eftir ferð megnaðu tær at sláa bóltin ígjøgnum blokadurnar hjá SÍ.

Mjølnir, sum hevur tapt tveir av teimum síðstu dystunum, vísti í løtum stóra styrki og hevur við hesum sigrinum meldað seg innaftur í oddastríðið, meðan SÍ hósdagin skal ígjøgnum eina grannauppgerð ímóti Drátti, áðrenn tað er greitt, um steypafinalusessurin fer til Sørvágs ella kanska skal enda hjá onkrum av hinum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# TB við at fóta sær

**KVINNUFLOGBÓLTUR Eftir ein sannførandi 3-0 sigur á Fleyr í gjár, er líkt til, at TB-kvinnurnar eru við at fóta sær, hóast tær enn ikki eru við heilt har frammi**

Hilmar Jan Hansen

– Vit hava síðstu tvær vikurnar arbeitt við ymsum tingum, sum skulu hjálpa okkum at røkka teimum úrslitum, vit fegin vilja. Millum annað hava vit tosað nógv um mentalitetin á liðnum, at vit ikki skulu fara niður við høvdinum, bara tí vit tapa ein bólt, sigur Gudrid Nolsøe, sum er spælandi venjari hjá TB.

– Somuleiðis hava vit gjørt nógv við samanhaldið, tí tað krevur eitt sindur, tá aldursspjaðingin er so stór, sum hon er hjá okkum, har onkrar eru sera ungar og aðrar meira tilkomnar. Tá vit tosa um sjálvt spælið, hava vit eisini gjørt nógv við at vant álop og verju, so vit fáa betur stýrt spælinum hjá okkum.

Miðvísa arbeiðið vísti seg at geva úrslit í gjár, tá Fleyr var á vitjan í Trongisvági, tí dysturin endaði við einum sannførandi 3-0 sigri til TB, sum helst bara verður sterkari, so hvørt sum Katrin Petersen og Sólvá Dimon koma í betri venjing. Nú sær út til, at báðar verða við á liðnum í vetur kortini.

Talan var um ein dyst, har tað leikaði rímiliga javnt á í fyrsta setti, men har munurin ordiliga kom til sjóndar tey bæði seinnu settini. TB-kvinnurnar stríddust væl, fingu nógv uppaftur av gólvinum og spældu sum eitt lið, meðan Fleyr-liðið – ið kanska helt seg hava vunnið longu undan dystinum – ikki tóktist vera í javnvág, men enntá mátti taka til takkar við gulum korti, tá frustratiónir gjørdu vart við seg.

Framvegis er Fleyr kortini við heilt har frammi og bert tvey stig aftan fyri oddaliðið, men kundi við einum sigri í gjár lagt seg á odda hjá kvinnunum. TB er enn eitt sindur longur burtur frá toppinum, men sær út til at fóta sær eftir laka byrjan.




*Myndir: Álvur Haraldsen*

# ÍF bjóðar nú av

**KVINNUFLOGBÓLTUR – Tað hevur tikið okkum eitt sindur av tíð at koma fyri okkum, eftir at vit taptu teir báðar fyrstu dystirnar, men nú eru vit við at vera har, sigur venjarin hjá ÍF-kvinnunum, Magnús Aðalsteinsson**

Hilmar Jan Hansen



Venjarin, sum kvinnurnar hjá ÍF hava í vetur, Magnús Aðalsteinsson, er ikki nakað ókent navn í føroyskum flogbólti, tí hann var fyri fáum árum síðani landsliðsvenjari her. Í vetur er hann so aftur komin hendavegin at royna seg.

– Eg kom ikki til Føroya, fyrr enn bert tvær vikur undan kappingarbyrjan, so vit høvdu líkasum ikki fingið alt upp á pláss undan fyrstu dystunum. Vit taptu eisini teir báðar fyrstu, úti ímóti SÍ og heima ímóti Fleyr, og tað skyldaðist fyrst og fremst, at vit komu nokk so seint í gongd, sigur ÍF-venjarin, sum hevur arbeitt miðvíst við at betra spælið eftir tey bæði tapini.

– Sjálvur haldi eg, at vit hava eitt gott lið, ið saktans kann bjóða av, tí her eru fleiri góðir spælarar og ein fínur hugburður. Nú er bara eitt umfar eftir av fyrsta triðinginum, so eg veit ikki, um vit klára at vinna okkum í steypafinaluna við oddasessinum eftir næsta dyst, tí neyvan missir SÍ oddasessin nú. Men minni kann eisini gera tað, tí eg føli, at vit hava fingið gongd á og eru ávegis nú, og í løtuni sær í øllum førum gott út hjá okkum.

Síðani fyrstu tvey tapini, hevur ÍF vunnið sínar fýra dystir, harav teir feskastu eru tveir útisigrar – fyrst 3-1 á Drátti hóskvøldið og síðani 3-0 á KÍF leygardagin. Sigrar, ið gera, at ÍF nú hevur sama stigatal sum Mjølnir og Fleyr, ið bara eru tvey stig aftan fyri oddaliðið, SÍ.

Í dystinum ímóti Drátti byrjaði ÍF væl og vann fyrsta sett, og liðið var eisini væl í gongd í øðrum setti, men hóast 18-12 á odda, tapti ÍF settið. Takkað veri fyrst og fremst góðum verjuspæli, megnaði ÍF at halda tørn tey bæði síðstu settini, so sigurin kom til høldar í einum dysti, har bæði lið royndu, men ÍF bara var tað drúgvari.

Leygardagin gjørdist tað so ein enn greiðari sigur á KÍF, ið royndi at stríðast, men kortini ikki fekk gjørt stórvegis við ÍF-kvinnurnar, sum høvdu gott tamarhald á dystinum so at siga alla tíðina.

*hilmarjan@sosialurin.fo*